# Til kommunurnar í Eysturoy

**Lions Club Eysturoy**

Næstan í hvørjari kommunu munnu vera eitt ella fleiri fólk, sum eru rørslutarnað, tað veri seg av heilabløðing, blóðtøppi, liðagikt ella av øðrum orsøkum.

Flestu hesi hava ein tørv á uppvenjing fyri at koma fyri seg aftur, ella fyri at sjúkan ikki skal fáa yvirtakið.

Vanliga verður tílík uppvenjing givin á sjúkrahúsinum í Havn ella á sjúkrahúsinum í Klaksvík. Hetta er tung skipan og verður tí ikki brúkt eftir tí veruliga tørvinum.

Í Eysturoy hava vit umstøður til uppvenjing, sum ikki verða brúktar optimalt. Her verður hugsað um serupphitaðar hyljar og fysioterapiviðgerðarstøð.

Ein orsøk til at hesir fasilitetir ikki vera nýttir til fulnar er eftir okkara meting og tí vit hava fingið at vita frá sjúklingunum, at tað er kostnaðarmikið fyri tann einstaka í flutningi, at tað vantar ein flutningsskipan fyri rørslutarnað.

Lions Club Eysturoy hevur sett sær sum mál at royna at fáa bøtt um hesi viðurskifti. Nú er tað so, at landið veitir stuðul uppá 45% til serflutningstænastu. Men bert í Havn og Klaksvík verður gjørd nýtsla av hesari skipan.

Fyri at kunna kommunurnar nærri um hesa skipan og hvussu hon eventuelt kann samskipast og setast í verk her í oynni, vilja vit hervið bjóða einum umboði frá hvørjari kommunu í Eysturoy til fund í **Matarsalinum í Ítróttarhøllini á Skála mánakvøldið 2. apríl kl. 20.** Á fundinum verða eisini umboð fyri Almanna- og heilsumálastýrið og umboð fyri busseigarar við lift.

Vinarliga boða frá til Jóhan Petersen, Glyvrar, tlf. 447942 ella fartlf. 217942 áðrenn 28. mars.

# Viðvíkjandi Leirvíksfjarðarleiðini

Til Vinnumálastýrið

Okkum er vorðið kunnugt, at m/f Dúgvan fer í dokk í apríl mðr. og at einasta far, ið verður sett inn í ein heilan mánað, sum skipið er í dokk, er m/f Ternan.

Vit fara at gera vart við, at hetta verður til stóran bága fyri vinnuna her og samstundis verður alt ov trongligt hjá ferðafólki og bilum.

Royndirnar frá farnum tíðin áttu at havt lært okkum, at hetta ikki ber til. Í dag er Dúgvan ov lítil, og við tí skipan vit nú hava, er henda rutan ein stór forðan fyri dagligu ferðingini bæði hjá vinnu o.ø.

Samstundis skal verða gjørt tykkum vart við, at um einir 100 skúlanæmingar ferðast millum Leirvík/Klaksvík v.v. dagliga.

Vit fara tí við hesum at átala hesa líkasælu viðferð av Leirvíksfjarðarleiðini.

Okkum er upplýst, at m/f »Anne Læsø«, sum fyrr hevur avloyst her, kann fáast til leigu henda mánaðin.

Vit fara tí at biðja Vinnumálastýrið og Strandferðsluna at bera so í bandi, at hesi bæði skip kunnu røkj Leirvíksleiðina meðan m/f Dúgvan er í dokk, ella at ein betri loysn verður funnin.

Um hetta ikki verður, koma stórir trupulleikar at standast av hesum bæði fyri vinnuna og ferðafólk annars og soleiðis fyri ferðingina um Leirvíksfjørð.

Ynskjst aðrar upplýsingar, so setið tykkum í samband við okkum.

Løgtingsumboðini
fyri Norðoyggjar
Jógvan við Keldu
Rúna Sivertsen
Heini O. Heinesen
Vilhelm Johannesen

**VIÐMERKINGAR**

# Á sjálvstýrisleið

**Birgir Mohr**
*Sandi*



Hóast samgongan nú nærkast jørðini aftur í sjálvstýrispolitikkinum, so kann ein ivast í, um tað bert verður ein NÝGGJ PROKLAMATIÓN, ella veruligur hóvligur sjálvstýrispolitikkur við jarðfesti.

Um ikki málið var so álvarsamt fyri okkara framtíð, so kundu vit øll flent í kíki, hvørja ferð samgongan er komin við uppskotum um proklamatiónir í ríkisrættarpolitikkinum og harvið framlagt síni tørvandi evni á hesum økinum. Og tó at vit av royndum vita, at umboð fyri ávísan politiskan flokk altíð hava verið best oman fyri hálsvølin, men sjáldan hava dugað til praktiskan politikk, so óttast vit fyri avleiðingunum av politikkinum hjá eini samgongu, sum sýnist meira ella minni desperat á hesum økinum í løtuni.

Vit onnur høvdu rætt, tá vit søgdu frá, at politikkurin hjá samgonguni í sjálvstýrismálinum fór at kollsigla. Vit hava eisini rætt, tá vit siga, at hetta mál hevur tikið alt ov stóran part av politisku orkuni í Føroyum seinastu trý árini, uttan at vera komin longur enn til eina møguliga proklamatión í løgtinginum. Hetta er veruleikin í dag.

Væl vitandi, at tað ikki verður dámt av øllum, at sannleikin verður blotlagdur, so má hann kortini sigast; og hvat hava vit so í væntu, nú aftur ein proklamatión verður framleidd? Jú, skattahækkingar, skert livifrælsi og harvið munandi lækkandi vælferð, hóast vit hava havt og hava vinnuliga sera góðar tíðir á Føroya klettum. Hetta verður úrslitið, um nýggja sjálvstýrisuppskotið verður annað enn ein nýggj proklamatión, tí eigur uppskotið at verða munandi broytt á fleiri økjum.

Løgmaður lovaði fyri opnum sjónvarpsskíggja áðrenn hann fór til Danmarkar við fyrstu fullveldisproklamatiónini, ikki at fremja nakra ætlan í sjálvstýrismálinum, sum kom at innibera, at vit mistu blokkstuðulin innan fyri 4 ár, tí hann og vit kendu avleiðingarnar av hesum sambært Hvítubók, Caragata-álitið og íslendsku útrokningarnar. Harafturímóti lovaði hann eina lagaliga loysn upp á min. 15 ára niðurlaging av blokkinum. Avleiðingarnar av 15 ára niðurlaging eru eisini nóg mikið fyri Føroya fólk sambært Hvítubók.

Men hvat ger løgmaður nú saman við hinum samgonguflokkunum? Jú, hann kutar 400 mill. kr. av blokkinum – 40% – eftir einum ári???

Sat eg hinu megin borðið – har danir sita – og upplivdi slíka føryska arrogansu, so bað eg føroyingar kuta restina av blokkinum í tveimum – yvir tvey ár við 30% hvørt árið, so er blokkurin burtur. Tí at somu politikarar, sum fyri minni enn trimum árum síðani bóðu um at fáa sama blokk hækkaðan og sum skovlaðu pening heim til Føroya í sambandi við bankagølumálið, teir tveita nú pening aftur á danir í fleiri hundraðtals milliónum, sum um okkum ikki tørvar nakran blokkstuðul úr Danmark? Men veruleikin er ein annar.

Hendir hetta, hvar skal peningur tá koma til konsolideringina, sum formaðurin í búskaparráðnum – tjóðveldismaður helst – sigur vera so alneyðuga fyri føroyska búskapin í hesum gulltíðum? Hvar skulu pengarnir til búskapargrunnin koma frá? Til allar tær stóru samfelagsíløgurnar, sum liggja á láni, umframt ábøtur á tann sosiala sektorin sum heild, og tey møguleikaskerdu og pensionistarnar einamest, sum er bráðneyðugt?

Tað verður baksláttur við lít, um slíkt hendir. Takið tí og broytið í hvussu er hendan partin av sjálvstýrisuppskotinum til eina 15 ára niðurlaging av blokkinum í hvussu er, soleiðis sum løgmaður hevur lovað tað.

At yvirtaka eftirstandandi málsøki sambært heimastýrislógini er í prinsippinum í lagi, men tað kostar og tað tekur tíð at gera hetta, soleiðis at umsitingin, sum skal yvirtaka, er væl fyrireikað og kemur at riggað betur enn verandi »Tinganes og omegn« ger í løtuni.

Tí er tað alt ov stutt skotbráð at yvirtaka alt frá 2002 til 2008. Hetta er ov optimistiskt og eigur at verða broytt til at geva tíð til neyðugu fyrireikingarnar.

Vælsignaðir, broytið uppskotið soleiðis, at tað fær eina breiða undirtøku í løgtinginum. Annars verður tað enn bert ein proklamatión, sum verður avtikin eftir næsta val, og hvat er er vunnið?

Bleiv uppskotið broytt tann hóvliga vegin, ein munandi part, so tað fekk breiða undirtøku, so kundi tað blivið ein partur av komandi sjálvstýrispolitikkinum og ikki bert ein proklamatión, men tað krevur politiskan vilja og mót.

# Model av teinæringinum er nú smíðað

TEINÆRINGURIN
*Tíðindaskriv*

Felagið Teinæringurin varð stovnað 24. oktober 1999 í Norðurlandahúsinum.

Nevndin hevur síðan tá arbeitt við at fáa ein borðbát (modell) smíðaðan, sum kann verða nýttur sum fyrimynd.

Ætlanin er at fara undir at smíða tann stóra bátin í heyst.

Nú hevur Hanus Jensen, bátasmiður, smíðað okkum henda borðbát.

Lutfallið er 1:10, og longdin er um 130 cm.

Hanus, sum í løtuni arbeiðir í Víkingaskipasavninum í Roskilde, kemur sjálvur upp til Føroya við bátinum fríggjadagin.

Í tí sambandi fara vit at skipa fyri ymiskum tiltøkum at lýsa verkætlanina.

Hanus Jensen fer at greiða frá sínum hugsanum um stóra bátin, nevndur Teinæringur, og hvørjar tankar hann hevur gjørt sær, nú hann hevur arbeitt við at gera borðbátin.

Vit hava fingið loyvið at hava fyrilesturin á Føroya Fornminnissavnið í Hoyvík, - í Brekkutúni 6, - í hugnaliga umhvørvinum har gomlu bátarnir standa.

Fyrilesturin verður sunnudagin 25. mars kl. 17.



- framsýningin hjá savninum er annars opin frá kl. 15 til 17.

Høvi verður at síggja borðbátin og at vera við í kjakinum aftaná.

So vítt vit vita, var ein teinæringur í Mykinesi einaferð í 1600-talinum. Tað er tí ikki vanliga kendur føroyskur bátur, tað snýr seg um. Teinæringurin verður eftir ætlanini uml. 13 metrar til longdar, og verður rógvin av 18 ella 20 monnum. Eisini fer hann at hava stórt segl.

Upplýsandi tilfar verður í løtuni gjørt um verkætlanina, felagið og bátin.

in og hvør kann tekna seg sum limur í felagnum, bæði einstaklingar og feløg.

Øll eru vælkomin, sigur nevndin í Teinæringinum.



Føroya størsta úrval av
PAKKITILFARI
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:
* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Íblandingarevni
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

...sjálvandi til besta prísin!!

FARPACK
Staravegur 5, P.O. Box 3099
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 35 30 00
Fax +298 35 30 10
E-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com



Stóra bringu
-ella lítla?

Ert tú ein av teimum 80%, ið ganga í skeivari BH-stødd?

Støkk so inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa tær at finna júst tína stødd.

Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm í ummáli, og frá AA til H skál.

Vit hava eisini korsilett í stórum støddum

siri
liv & heilsa
Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610

Sosialurin - 311820

**Toll- og Skattstova Føroya**

# Starv á Toll- og Skattstovu Føroya, Norðoya Øki

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Norðoya Øki, er starv leyst at søkja til setan skjótast til ber.

**Arbeiðsuppgávur**
Eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt, toll, innkrevjing o.a., herundir at ummæla møgulig kærumál. Viðkomandi kemur at luttaka í útpantingum.

**Førleikakrøv**
Viðkomandi, ið settur verður, skal hava
- skrivstovuútbúgving og roknskaparligan førleika, ið minsta lagið HH
- royndir við innkrevjing av peningakrøvum
- kunnleika til mannagondir við útpanting
- góð samstarvsevnir, verða fyrikomandi og kunna arbeiða sjálvstøðugt
- kunnleika til EDV og
- helst eisini førleika innan almenna fyrisiting

Harafturat skal viðkomandi vera fúsur at luttaka í skeiðum og útbúgvingum, ið Toll- og Skattstova Føroya fyriskipar.

**Vit kunna bjóða:**
- eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi
- klokkuskipan við flextíð
- eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Løn og setanarviðurskifti:**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.
Núverandi starvsøki er Toll- og Skattstova Føroya, Norðoya Øki, men fevnir setanarøkið eisini um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing um starvið fæst við at venda sær til Toll- og Skattstova Føroya, Norðoya Øki, Karl Vilhelm Thomsen, økisstjóra, tlf 456877

**Umsóknir:**
Umsóknir við avritum av prógvum og viðmælum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi 9. apríl 2001.

**Toll- og Skattstovu Føroya**
Norðoya Øki
Postsmoga 16
FO-700 Klaksvík

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 145 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær 6 økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin. Í Norðoya Øki har viðkomandi kemur at starvast, starvast 11 fólk

MAZDA 626, 7 pers. Stationcar 2.0 Turbo Diesel
Myrkagrønur metallic, vælhildin, fjarstýrt centrallás
CD anlegg, elrútar, elspegl v.m.
km. 59.000, Nov. 99
kr. 158.000

D. B. Bilar
J. Boncksgøta 15 • Boks 1079
Tel. 31 06 00 • Fax 31 06 50

GEVIÐ BLÓÐ

www.sosialurin.fo

Søkt verður eftir

## Handilshøli

í Runavík.

Skal standa við Heiðavegin og hava góðar parkeringsmøguleikar.

Skriva til:
**Sosialurin,**
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 620



## Teinæringurin

Sunnudagin 25. mars kl. 17 verður nýsmíðaði borðbáturin sýndur fram á Fornminnissavninum í Hoyvík, í framsýningarhølunum í Brekkutúni 6.

Hanus Jensen fer at greiða frá sínum hugsanum um stóra bátin, og hvørjar tankar hann hevur gjørt sær, nú hann hevur arbeitt við at gera borðbátin.

Aftaná verður kjak.

**Nevndin**

## Pedagogar

**Søkt verður eftir:**
1 pedagogi, 30 t. um vikuna, til eina stovu við 12 vøggustovubørnum frá 01 mai 2001, ella eftir nærri avtalu, til 30 apríl 2002 vegna farloyvi.

**Vegna ov fáar umsóknir verður lýst av nýggjum eftir:**
1 pedagogi, 35 tímar um vikuna, til eina stovu við 18 barnagarðsbørnum skjótast til ber og fram til 15 november 2001 vegna barnsburðafarloyvi.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum er normeraður til 42 barnagarðsbørn, 12 vøggustovubørn, 8 pedagogar, 4 hjálparfólk og 3 stuðlar.

Lønarfl. 11/13 sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Um eingin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett ístaðin.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 03. apríl 2001.

**Kongshavnar Barnagarð og Vøggustovu**
Heiðavegur
Postboks 119
Fo-600 Saltangará